

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 07 - 2012

# Vilja kanna um oljan er ov dýr í Bretlandi

Í Bretlandi krevja støðugt fleiri politikarar, at tað verður kannað, um bankar og onnur hava samstarvað á ein hátt, sum hevur gjørt, at tann bretski brúkarin hevur verið noyddur at gjalda meiri fyri olju, benzin og gass, enn hann í veruleikanum átti at gjørt. Illgrunin hevur sín uppruna í gøluni í bretska bankakervinum um Libor-rentuna. Sambært bretskum fjølmiðlum bendir ymiskt á, at eitt slag av samstarvi hevur verið, og at oljan kundi verið væl bíligari, enn hon hevur verið. Sagt verður, at starvsfólk hjá bankum og oljufeløgum og onnur, sum arbeiða við sáttmálum um olju, hava viðvirkað til at halda prísinum uppi, og sambært fjølmiðlunum hava tey verið til reiðar at brúka teir møguleikar, sum vóru tøkir. Higartil hava umleið 100 parlamentslimir heitt á avvarandi myndugleikar um at kanna, um teir bretsku brúkararnir hava goldið óneyðuga nógv fyri brennievnið. Forsætisráðharrin, David Cameron, hevur ikki lagt seg út í orðaskiftið, men talsfólk hansara hava sagt, at forsætisráðharrin heldur tað vera umráðandi at fáa staðfest, at handilin við olju er reiðiligur og ikki ávirkaður av óynsktum viðurskiftum, sum hann málber seg.